# Biða um frí fyri Gerrard

Venjarin hjá Liverpool, Rafael Benitez, vónar, at enski landsliðsvenjarin Fabio Capello ikki fer at úttaka Steven Gerrard til komandi landsdyst hjá Onglandi. Gerrard stríðist við skaða í lærkrikanum, og Liverpool-venjarin vónar, at Capello fer at geva Gerrard frí, hóast hann kanska fær spælitíð í dystinum hjá Liverpool í kvøld. - Eg dugi ikki at sígja nakra orsøk til, at ein spælari, sum ikki hevur vant við okkum seinastu 15 dagarnar, verður úttikin til landsliðið, sigur Benitez.



# Lahm standa skúlarætt

Verjuspælarin Philipp Lahm skal nú standa skúlarætt hjá leiðsluni í týska stórfelagnum FC Bayern. Orsøkin til tað er, at Lahm hevur funnist at, hvussu felagið hevur keypt og selt spælarar. Stjórin í felagnum, Uli Hoeness er misnøgdur við útsagnir hjá Lahm, og hann sigur avgjørdur, at Lahm hevur brotið reglarnar hjá felagnum, og tað kemur hann at angra.

# gunum



Forsetaskeiðið hevur verið merkt av rumbli, og seinastu vikurnar hava verið alt annað enn stuttligar. Kortini er Høgni í Stórustovu til reiðar at vera tann, sum er við til at seta kósina næstu fetini hjá Fótbóltssambandi Føroya